# NORÐDEPIL

Fólkatal: 167 (2017). Hvannasunds kommuna. / *Population: 167 (2017). Municipality of Hvannasund.*









Her ert tú
*You are here*

Dekkverkstaður
*Tire Workshop*

Matvøruhandilin Fossábúðin
*The Food Shop Fossábúðin*

Venjingarmiðstøðin Fossá Fitness
*Fossá Fitness*

Norðoya motorsavn
*The museum Norðoya motorsavn*

Hjartastartari
*Defibrillator*

Neyð og hjálp
*Emergency call* **112**

## FO

Norðdepil telist millum yngstu bygdir í Føroyum, og her er bæði handil, venjingarmiðstøð og einasta ljóskurv uttan fyri høvuðstaðin.

**Søga**

Poul Sivert Sivertsen úr Frammistovu í Hvannasundi og kona hansara Marin Kristianna, ið var ættað frá Gjógv, vóru í 1866 tey fyrstu, sum búsettust í Norðdepli. Hjúnini bygdu hús, handil og fiskamóttøku, og hóast tey ikki her gjørdust gomul, so eru enn spor eftir tey í Norðdepli. Sethús (1) hjá eftirkomarum teirra standa á somu grund sum upprunaligu húsini, og minnismerki (2) er reist yvir tey á torginum miðskeiðis í bygdini. Næstu niðursetufólkini vóru Jóannes Olsen úr Uppistovu í Hvannasundi og Jakobina úr Tróndhúsi í Norðragøtu, ið fluttu til Norðdepils í 1967. Jóannes varð kallaður Jóannes Fyri Handan, og skelti við navninum er at finna á upprunaligu húsum hansara (3).

**Minnisvarði**

Tollaksmessudag í 1913 brast óvæntað óveður á, og tríggjar bátsmanningar úr Norðoyggjum gingu burtur. Harímillum var Norðdepilsbáturin, ein bátsmanning úr Kunoy og ein av Skarði. Á 100 ára degnum eftir hendingina varð minnisvarði teirra sjólátnu (4) reistur í Norðdepli.

**Aina Cederblom**

Í 1933 sigldi ævintýrarin og vevkvinnan Aina Cederblom einsamøll í lítla motorbátinum Rospiggen úr Svøríki til Føroya. Hon kom á land her (5).

**Skúlin á Fossánesi**

Skúlin á Fossánesi (6) varð tikin í nýtslu í 1983, og øll børnini í kommununi ganga í skúlanum til og við 7. flokk. Framhaldsdeildin er í Klaksvík.

**Vinna**

Hvalastøðin á Kópagørðum (7) í Norðdepli var virkin frá 1898-1912 og í 1920. Í 1963 lat flakavirki (8) upp í bygdini. Nú tað ikki longur er virkið, verða partar av bygningunum nýttir til virksemi hjá alifyritøkuni Bakkafrosti (9). Fiskavørurnar frá Norðfrá eru mentar í Norðdepli, har fyritøkan helt til frá 1989 til 2015.

**Trúarlív**

Brøðrasamkoman er virkin í bygdini og heldur til í salinum Hermon (10), har ung og eldri úr allari kommununi ganga á møti og ungdómsmøti. Kirkjugarðurin (11) í Norðdepli varð vígdur í 1917, og frammanundan hesum vórðu líkini flutt til Viðareiðis at verða jarðað.

## EN

*Norðdepil is among the youngest villages in the Faroe Islands. Here you will find both a store, a fitness centre and the only traffic signal outside of the capital.*

**History**

*Poul Sivert Sivertsen from Frammistovu in Hvannasund and his wife Marin Kristianna from Gjógv were the first to settle in Norðdepil in 1866. The married couple built a house, a store and a place to process fish, and even though they did not reach old age, there are still traces of them in Norðdepil. The residence (1) of their descendants rests on the same foundations as the original house, and a monument (2) was erected on the village square to commemorate them. The next settlers were Jóannes Olsen from Uppistovu in Hvannasund and Jakobina from Tróndhúsi in Norðagøta. They moved to Norðdepil in 1967. Jóannes was called „Jóannes Fyri Handan", and a sign bearing this name can be found outside the house that he originally lived in (3).*

**Memorial Monument**

*The day before Christmas in 1913, an unexpected storm broke out and three boat crews from the Northern Islands were lost at sea – the boat from Norðdepil, a boat crew from Kunoy and one from Skarð. On the 100th year anniversary of the tragic event, a memorial monument dedicated (4) to those who perished was erected in Norðdepil.*

**Aina Cederblom**

*In 1933, the adventurer and weaver Aina Cederblom sailed single-handedly in the little motor boat Rospiggen from Sweden to the Faroe Islands. She came ashore here (5).*

**The School at Fossánes**

*The School at Fossánes (6) opened in 1983, and all of the children in the municipality attend school here up to the seventh form. The lower-secondary school is in Klaksvík.*

**Industry**

*The whaling station at Kópagørðum (7) in Norðdepil was active from 1898-1912 and in 1920. In 1963, a fish factory (8) opened in the village. Since it is no longer active, parts of the building are used by the sea farming company Bakkafrost (9). The fish goods from Norðfrá were developed in Norðdepil. Norðfrá was located in the village from 1989 to 2015.*

**Religious Life**

*The Plymouth Brethren are active in the village and are to be found in the Hermon hall (10), where young and old from the entire municipality attend Christian meetings and youth meetings. The cemetery (11) in Norðdepil was consecrated in 1917. Previous to this, bodies were transported to Viðareiði for burial.*

**Ver ein hjálpirót**

- Lat einki órudd liggja eftir tær – rudda heldur upp.
- Stuðla bygdunum – keyp staðbundnar vørur.

**Be a helping root**

*Hjálpirót is the Faroese word for rose root (Rhodiola rosea), a flourishing plant traditionally used for medicine. Hjálpirót means „helping root", and you can be one by following these simple steps.*

- *Please do not litter – but feel free to pick up litter on your way.*
- *Support the local community – buy local goods.*

*

**Tá ið tú fert til fjals**

- Best er at hava staðkendan ferðaleiðara við á túrum í fjøllunum - nærri kunning fæst á Norðoya Kunningarstovu.
- Boða onkrum frá, um tú fert til fjals uttan ferðaleiðara.
- Fylg rásum og varðum, og minst til at lata hagaportrini aftur eftir tær.
- Gev seyði, fugli og gróðuri frið.

**Hiking advice**

- *We recommend that you bring a local guide with you on mountain hikes in the Northern Islands. Please contact Visit Norðoy for further information about guided hiking trips.*
- *If you do go on your own, please let your host know where you are going.*
- *Follow the paths and cairns, and close the outfield gates behind you.*
- *Avoid disturbing sheep, birds and plants.*

Nærri kunning um trygd á fjalltúrum fæst við at skanna hesa kotu.

*For more information about safe hiking in the Faroe Islands, please scan this code.*

Visit Norðoy Tel. + 298 456939

Skanna hesa kotu, og kunna teg nærri um ferðamøguleikar í Norðoyggjum.

*Scan this code, and get more information about travelling in the Northern Islands.*

## VIT VIÐMÆLA

**Vitjan á Norðoya motorsavni**

Norðoya motorsavn (12) hýsir gomlum motorum, ið eldsálir úr bygdini hava umvælt. Savnið læt upp í 2006 og heldur til í gamla skúlanum frá 1895, ið verður kallaður „Universitetið í Norðdepli". Ring til Norðoya kunningarstovu um tú hevur hug at síggja savnið.

## LOCAL'S CHOICE

**Visit Norðoya Motorsavn**

*The museum (12) houses old engines repaired by local people passionate about engines. The museum opened in 2006 and is to be found at the old school from 1895, known as „The University of Norðdepil". For visits to the museum, pleace contact Visit Norðoy.*